Áheitan um tillagingar í tonsaskattalógini

Rani Reginsson Johansen RaniReginsson.Johansen@taks.fo
TAKS

Her eru nakrar tankar, sum vit hava gjørt okkum í sambandi við uppskotinum frá RFH. Vit fara í feriu nú, so møguliga kunnu vit umrøða tað saman í august mánað.

> RFH hevur gjørt tvey uppskot til broyting av § 4, stk. 2, í løgtingslóg um skatting av reiðarívirksemi, sum viðvíkur treytina um skráseting í FAS ella Føroya Skipakráseting, ið m.a. hevur til endamáls at tryggja, at útlendsk reiðarí ikki kunnu gera brúk av tonsaskattaskipanina í Føroyum uttan at vera skrásett í Føroyum.
>
> Grundgevingin handan hesi broytingaruppskot er, at undantakið fyri at lata seg skráseta í FAS ella Føroya Skipaskráseting, t.e., at treytin fyri skráseting ikki er galdandi fyri stutttíðar time-charter í upp til 2 mánaðir, ikki í nøktandi mun tekur atlit at kappingarførið hjá føroyskum reiðaríum.
>
> Sambært RFH er tað neyðugt við broytingum, soleiðis at føroysk reiðarí framvegis kunnu nýta tonsaskattaskipanina, tá tey mugu leiga skip í sambandi við, at nýtt skip verður bygt, nýtt skip verður keypt, skip verður umvælt ella umbygt, ella reiðaríið vil royna nýggja rutu ella nýggjan vinnuveg. Helst eru tveir mánaðir eitt ov stutt tíðarskeið fyri føroysku reiðaríini.
>
> Tað fyrsta broytingaruppskotið (uppskot 1) víðkar um undantakið til skráseting, soleiðis at undantak eisini er galdandi fyri skip strategiskt og handilsliga rikin úr Føroyum, herundir eisini skip, sum ikki verða leigað time-charter.
>
> Tað næsta broytingaruppskotið (uppskot 2) víðkar um undantakið til skráseting, soleiðis at undantakið fyri stutttíðar time-charter verður broytt til langtíðar time-charter upp til 5 ár.
>
> Bæði uppskotini kunnu økja um talið av skipum, sum vilja lata seg skráseta hjá TAKS undir tonsaskatting.
>
> Málsviðgerðin hjá TAKS kann gerast drúgvari, um støða skal takast til, um skip verður strategiskt og handilsliga rikin úr Føroyum, og um TAKS skal heinta inn og skráseta upplýsingar um útlendskar veruligar eigarar, og fráboða onnur rættardømi, tá skráseting fyri tonsaskatting verður játtað, sambært *BEPS Action 5 on harmful tax practices*. Serliga uppskot 2 kann í stóran mun lata upp fyri, at fleiri reiðarí við tilknýti til útlond lata seg skráseta undir tonsaskatting í Føroyum. Í hesum sambandi er tað vert at viðmerkja, at *Hvidvasksekretariatet* í *Den Nationale Risikovurdering af Hvidvask* (2022) metti, at váðin fyri hvítvask gjøgnum feløg við skip skrásett í FAS var **høgur**:

HVIDVASK VIA SELSKABER, SOM EJER SKIBE REGISTRERET I FAS

Hvidvasksekretariatet har oplysninger, der indikerer, at kriminelle aktører hvidvasker penge gennem selskaber med skibe registreret i FAS-registret. Det er muligt for kriminelle aktører at føre store beløb gennem disse selskaber og videre til lande med svagere hvidvaskforanstaltninger.

I åbne kilder er det blevet belyst, at en islandsk fiskerivirksomhed har misbrugt FAS-ordningen til at snyde med skatteforhold.

Den islandske fiskerivirksomhed har gennem datterselskaber på Færøerne aflønnet fiskere i Namibia gennem FAS-ordningen. Dette er sket ved at lade fiskerne registrere som ansatte på færøske fragtskibe, til trods for at de reelt arbejdede på fiskefartøjer ud for Namibias kyster (Rigsombudsmanden for Færøerne 2021a).

Hvidvasksekretariatet vurderer, at det er sandsynligt, at udenlandske selskaber kanaliserer midler, der stammer fra kriminalitet, gennem selskaber med skibe registreret i FAS, og at muligheden for at registrere skibe i FAS kan tiltrække selskaber, som ønsker at begå hvidvask.

Helst kann eitt broytingaruppskot gerast, sum røkkur setta endamálið, samstundis sum treytin um skráseting í FAS ella Føroya Skipaskráseting framvegis í stóran mun er krav. Tað kann til dømis gerast soleiðis:

Stk. 2. Tað er ein treyt, at skipini eru 100 bruttotons, BT, ella størri, og at tey eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS, ella Føroya Skipaskráseting. ~~*Hetta er tó ikki galdandi fyri stutttíðar time-charter í upp til 2 mánaðir.*~~

Stk. 4. Treytin í stk. 2 er ikki galdandi fyri skip, sum verða leigað við manning, time-charter, í upp til X mánaðir, og sum verða strategiskt og handilsliga rikin úr Føroyum, samstundis sum endamálið við at leiga skipið er at:

1) *virksemið kann halda fram, meðan nýbygging av skipi fer fram,*
2) *virksemið kann halda fram, meðan bíðað verður eftir keyptum skipi,*
3) *virksemið kann halda fram, meðan skip skulu umvælast ella umbyggjast, ella*
4) *royna nýggja rutu ella nýggjan vinnuveg, innan avgerð skal takast um íløgur í nýggjum skipi.*

Viðmerkingarnar kunnu útgreina, at reiðaríið skal skjalprógva, at nýbygging fer fram, at skip er keypt, at skip teirra verður umvælt ella umbygt, ella at reiðaríið roynir nýggja rutu ella nýggjan vinnuveg.

Vinarliga
Rani